68 fólk skulu veljast í eitt grundlógarráð

Gomlu vártingini skulu vekjast aftur til lívs. Føroyingar skulu innan flaggdagin á val at velja 68 fólk í eitt grundlógarráð, sum skal vekja forna siðin at halda várting í Føroyum. Endamálið er at fáa eina komandi føroyska stjórnarlóg til hoyringar hjá fólkinum

GRUNDLÓG
Ingi Rasmussen

Fólkið skal hoyrast. Stendur tað til landsstýrismannin við lógarmálum skulu heili 68 føroyingar veljast í eitt grundlógarráð. Øll kunn stilla upp, ið hava fingið 12 stillarar, sum eru løgtingsveljarar í valdøminum. Í hvørjum valdømi verða vald tvær ferðir so nógv umboð, sum umboða valdømi í Løgtinginum, tí í minsta lagi 6 umboð.

Innan 25. apríl í ár skulu føroyingar á val. Veljast skulu fólk í eitt grundlógarráð, og øll fólk, sum kunnu velja til løgtingsvalið, kunnu stilla upp.

Hetta er ein aðaltáttur í uppskoti til Grundlógarnevnd, sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, hevur lagt fyri løgtingið.

Fyrst skal ein grundlógarnevnd veljast at gera uppskot um grundleggjandi stjórnarlóg fyri Føroyar. Í uppskotinum skulu vera ásetingar um stýrisskipan, valdsbýti og grundleggjandi rættindi og skyldur hjá borgarunum. Hendan grundlógarnevndin, sum verður vald millum politisku flokkarnar og persónar við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum, skal byggja á herðarnar hjá gomlu grundlógarnevndini, sum ikki kom á mál við sínum setningi. Nýggja nevndin skal lata landsstýrismanninum álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 25. apríl 2005.

Eitt fólkavalt ráð

Ein aðaltanki í nýggja leistinum er at tryggja eina fólksliga undirtøku fyri komandi føroysku stjórnarlógini.

– Tað fólksliga skal partvíst loysast við, at nevndin sjálv fær betri umstøður at kunna og hoyra um arbeiði sítt. Men fyrst og fremst skulu vit lata Føroya fólk velja eitt grundlógarráð. Eitt slíkt ráð eigur at vekja til lívs gamlan føroyskan sið. Fyrr hildu føroyingar várting í øllum sýslunum og møttu síðani á tingi á Tinganesi at røða um landsins viðurskifti, sigur Høgni Hoydal í viðmerking til uppskotið.

Grundlógarráðið, sum telur 68 fólk, skal skipa fyri vártingum kring allar Føroyar, har ætlanin er at fáa eitt kjak um eina komandi grundlóg. Ráðið skal ikki fara ígjøgnum alt tilfarið hjá sjálvari grundlógarnevndini, men skal taka tey mest viðkomandi evnini til viðgerðar.

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá politisku flokkum, og á viðmerkingunum sæst greitt, at andstøðuflokkarnir eru ímóti einum grundlógarráði, men Høgni Hoydal og formaðurin í Grundlógarnevndini hava kortini hildið fast við hendan partin. Fæst ikki politisk undirtøka, er landsstýrismaðurin kortini sinnaður at viðgera onnur uppskot um, hvussu hoyringar av fólkinum kunnu fara fram.

21 manna nevnd

Í sjálvari grundlógarnevndini skulu sita tvey umboð fyri stóru flokkarnar á tingi, meðan smáu flokkarnir við trimum tinglimum og færri fáa eitt umboð. Harafturat fáa løgtingsformaðurin, løgmaður og landsstýrismaðurin við lógarmálum sæti í nevndini. Formaðurin í nevndini, sum verður útnevndur av landsstýrismanninum, velur síðani átta umboð við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum. Sostatt verða tilsamans 21 fólk í grundlógarnevndini – 13 politikarar og 8 samfelagsfrøðingar.

Seks milliónir

Óvist er, hvat framhaldandi grundlógararbeiðið fer at kosta.

Higartil hevur grundlógararbeiðið kostað 3 milliónir krónur og verður støðið tikið í hesum, verður mett, at írestandi kostnaðurin av at gera uppskotið til føroyska grundlóg liðugt verður tvær milliónir krónur afturat. Afturat hesum kemur kostnaðurin av at halda fólkaval til grundlógarráðið, sum verður mett til eina góða millión afturat. Sostatt verður samlaði kostnaðurin fyri eina føroyska grundlóg eftir hesum metingum 6 milliónir krónur.

Fakta

Býti í grundlógarráði:

Norðuroyar	8
Eysturoy	12
Vágar	6
Norðstreymoy	6
Suðurstreymoy	22
Sandoy	6
Suðuroy	8

Tilsamans 68 fólk

Andstøðan vrakar eitt fólkavalt ráð

Andstøðan vrakar tankan um eitt fólkavalt grundlógarráð, ið skal skipa fyri vártingum. Eitt slíkt ráð er ongin loysn og alt ov umfatandi, halda Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin. Teir minna eisini á, at orðið Grundlóg er ein óneyðugur fótongul

GRUNDLÓG
Ingi Rasmussen

Fólkslig undirtøka er loysunarorðið, nú nýggj grundlóg verður smíðað.

Undirtøkan skal tryggjast við einum grundlógarráði, og føroyingar skulu á val innan flaggdagin at velja 68 fólk kring alt landið í hetta ráðið, ætlar Høgni Hoydal landsstýrismaður við lógarmálum.

Men andstøðan tekur als ikki undir við hesum partinum av uppskotinum um grundlógarnevnd, sum er lagt fyri løgtingið. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava fingið uppskotið til hoyringar, og báðir flokkar vraka tankan um eitt serstakt fólkavalt grundlógarráð, ið skal skipa fyri vártingum sum í gomlum døgum.

– Uppskotið um grundlógarráð síggja vit ikki sum nakra loysn, tvørturímóti. Fólksligi parturin má kunna loysast á annan hátt, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna Sambandsflokksins í sínum stutta hoyringssvari.

Javnaðarflokkurin er eins avgjørdur og heldur als ikki, at ráð eru til eitt grundlógarráð.

– Ikki tí, fólksliga luttøkan og hoyringin eru av sera stórum týdningi, men at fara at velja 68 fólk í eitt ráð er alt ov trupult og alt ov kostnaðarmikið at fáast við. Og hvør vissa er fyri, at tey, sum vald verða, eru umboðandi fyri fólkið? spyr Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins. Hann undrast í somu vending á, at grundlógarráðið, sum er fólkavalt, bert skal fáa tilmælandi myndugleika, tí vanligt er, at fólkavald eisini fáa kompetansu.

Nevnd í staðin

Tað, sum er umráðandi, er at fólkið fær kunning og verður hoyrt, og tí hevur Javnaðarflokkurin eitt annað uppskot til, hvussu hetta verður framt. Flokkurin skjýtir upp, at grundlógarnevndin velur sær eina framløgunevnd av valdu nevndarlimunum, sum fær til uppgávu at leggja málið fram fyri fólkið. Skipast kann fyri fundum, oyggjatingum ella grundlógartingum runt landið, har uppskotini verða løgd fram, og har høvið síðan verður at kjakast um málið.

– Tá vilja tey, sum veruliga hava áhuga fyri málinum, møta upp og bera sjónarmið fram. Tað er eingin ivi um, at júst hesin hátturin vil geva tað breiðasta grundarlagið fyri tí fólksligu umboðanini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Annað heiti

Sambandsflokkurin vísir annars á, at grundlógarnevndin eigur at fáa annað heiti, eins og lógin, sum nevndin skal arbeiða við. Javnaðarflokkurin styðjar eisini hetta sjónarmiðið og mælir til, at heitið ikki frammanundan liggur fast.

– Grundlóg verður gjarna brúkt um grundleggjandi lógina í einum landi, sum hevur fullveldi. Tá hetta ikki er støðan hjá okkum, so kundu onnur heiti verið umhugsað, sigur Jóannes Eidesgaard og nevnir føroyalóg, evstalóg, stjórnarlóg ella stýrisskipanarlóg.

Møguleikarnir sum tað almenna ongantíð sá

- Eg haldi, vit kunnu siga, at kanningararbeiði hjá okkum er liðugt, og vit meta, at grundarlag er fyri hesi farleið, sigur Sámal Petur í Grund

SKÁLAFJARÐALEIÐIN
Vilmund Jacobsen

Sámal Petur við stýripinninum umborð á gomlu Ternu mikumorgunin. Lítið er at ivast í, at vit fara at undir siglingina millum Skálafjørðin og Sund, sigur hann.

Mynd: Vilmund Jacobsen

Løgtingið hevur nú endaliga avgjørt at broyta lógina um farma-og ferðafólkaflutning soleiðis, at Strandfaraskip Landsins ikki longur fer at røkja siglingina millum Skálafjørðin og Havnina. Nær farleiðin verður niðurlagd, er ikki endaliga avgjørt, men teir, sum sigla við gomlu Ternu, rokna við, at siglt verður hendan mánaðin aftrat; síðan verður helst givist, 1. mars. Øll manningin við gomlu Ternu – 5 í tali – eru avloysarar, og tí er eisini óvist, hvat hesir hava í væntu hjá Strandferðsluni, nú siglingin millum Skálafjørðin og Havnina verður niðurlagd.

Við fyrru atkvøðugreiðsluna á tingi vóru 23 løgtingslimir fyri at niðurleggja farleiðina og 6 ímóti. Við triðju og seinastu viðgerð vóru 20 fyri og 7 ímóti. Tað eru tinglimir Sambandsfloksins, sum hava verið ímóti at niðurleggja við lóg, men sum skilst, er ein partur av orsøkini hon, at teir ikki meta tað verða neyðugt við lógarbroyting fyri at fremja hesa ætlan.

Fyritreytirnar í lagi

Sosialurin var við gomlu Ternu úr Havn og inn á Skálafjørðin mikumorgunin. Á brúnni hittu vit stýrimannin, Sámal Petur í Grund, sum hendan morgunin sat við stýripinninum. Teir hava ta skipan, at skiparin situr í stólinum á leiðini suðureftir og stýrimaðurin á leiðini heimeftir.

Saman við øðrum hevur Sámal Petur søkt Vinnumálaráðið um loyvi at sleppa at røkja farleiðina millum Skálafjørðin og Sund á privatum grundarlagi.

Brævið til Vinnumálaráðið er dagfest, 18. september, og 17. januar hevur Vinnumálaráðið sagt seg vilja geva hetta loyvi, um figgjarligu viðurskiftini eru í lagi, at Skipasýnið góðtekur skipið, og at lógin um farma- og ferðafólkaflutning verður broytt.

- Vit hava havt neyvt samband við Vinnumálaráðið alla tíðina, og nú lógin er broytt, eru fyritreytirnar fyri loyvinum í lagi, sigur Sámal Petur í Grund.

Í november vóru teir, sum ætla sær undir hesa farleið, í Noregi og hugdu at skipum, og lík er ikki til, at tað verður nakar trupulleiki at finna eitt hóskandi skip til endamálið.

Sámal Petur sigur, at áhugin er størstur fyri einum skipaslagi, sum er eitt sindur størtri enn Dúgvan. Hetta skipið er nakað longri og breiðari enn Dúgvan.

- Skipaslagið, vit hugsa um, hevur tvey bildekk, har ovara dekkið er opið, meðan tað niðara er afturlatið. Henda ferjan hevur pláss fyri umleið 80 persónbilum – ella umleið 6 trailarum á hvørjum túri. Dúgvan hevur hinvegin pláss fyri 40 persónbilum, sigur hann.

Rullandi eindir

Sámal Petur sigur, at teir eru ógvuliga spentir uppá hesa ætlan, og hann ivast onga løtu í, at hon verður veruleiki.

- Nú lógin er broytt, og fyritreytirnar eru tær røttu, er okkara gerandisdagur byrjaður – á tann hátt, at nú kunnu vit miðvíst fara at leggja til rættis smálutirnar, og hvussu tíðarætlanin annars skal síggja út.

Hann dugir tó ikki at siga í løtuni, nær lagt verður til brots, men væntar, at gevst gamla Terna at røkja Skálafjarðaleiðina, 1. mars, verður ein tíð, har eingin sigling verður millum Skálafjørðin og Havnina.

- Eg haldi, vit kunnu siga, at kanningararbeiði hjá okkum er liðugt, og vit meta, at grundarlag er fyri hesi farleið.

Sámal Petur dylur ikki, at grundarlagið undir farleiðini í fyrsta lagi verður tær rullandi eindir, sum nú einaferð flyta seg millum Eysturoynna og meginøkið, og hesar eru ikki fáar og smáar, nú fiska-og farmaflutningurin millum oyggjarnar er so stórur.

- Vit hava eisini fingið eina oljuvinnu, sum við tíðini kemur at hava brúk fyri skipaðum flutningi millum Eysturoynna og meginøkið, sigur hann.

Sámal Petur vísir á, at stigtakararnir til nýggju farleiðina hava umrøtt ætlanina við tey stóru flutningsfeløgini, sum taka sær av fiskaflutninginum.

- Her er umráðandi at skipa so fyri, at nýggja farleiðin kemur at tæna báðum pørtum til gagns, sigur Sámal Petur í Grund.

Sterkt felag

Ætlandi verður eitt partafelag stovnað, sum kemur at taka sær av siglingini millum Skálafjørðin og Sund, og stigtakararnir miðja eftir, at hetta verður eitt sterkt felag.

Væntandi verða einir 5 mans við ferjuni, sum fer at røkja hesa farleið. Neyðugt verður so eisini við avloysarum.

Lítið man vera at ivast í, at ætlanin hjá Sámal Peturi og øðrum er skilagóð, tá ið havt verður í huga, hvussu stórur flutningurin við Dúgvuni var í sínari tíð.

Seinastu árini hevur gamla Terna røkt Skálafjarðasiglingina, og tað kunnu ikki vera fleiri meiningar vera um, at skipið er totalt óegnað.

Gamla Terna tekur ongar bilar og ongan farm og sum skip, lýkur hon ikki tey krøv, sum ferðafólk seta til ein hóskandi flutning í dag. Er veðrið vánaligt, fara fólk snøgt sagt ikki umborð á Ternuna.

Ætlanin hjá Sámal Peturi og øðrum er at sigla á Sund, fleiri túrar um samdøgnið, og longu nú koyrir Bussleiðin í Havn millum Havnina og Kollafjørð.

Verður rætt atborið, kann eitt hóskandi skip saktans taka sær av fiskaflutninginum við trailarum av Skálafjørðinum vestur í Vágar, Suðurstreym, Sandoynna og Suðuroynna.

Her eru nógvir møguleikar, sum tað almenna ongantíð hevur dugað at sæð.

Maðurin á dekkinum, Jógvan Hentze, hyggur at klokkuni. Væntandi siglir gamla Terna sín seinasta túr millum Skálafjørðin og Havnina síðst í hesum mánaðinum.

Mynd: Vilmund Jacobsen